Kommunala Arbeiðsgevarafelagið

# Ársfrágreiðing

2021

Kommunala Arbeiðsgevarafelagið

# Innihaldsyvirlit


Vælkomin ... 2
Gongdin í sáttmálasamráðingunum í 2021 ... 2
Føroya Handverkarafelag / Landsfelag Handverkaranna ... 2
Føroya Pedagogfelag ... 3
Havnar Arbeiðarafelag ... 4
Havnar Arbeiðskvinnufelag ... 5
Starvsfelagið – felags samráðingar saman við Fíggjarmálaráðnum ... 5
Heilsuhjálparafelagið ... 6
Sáttmálasamráðingar 2022 – ... 6
Starvsfelagið ... 6
Heilsuhjálparafelagið ... 7
Korona ... 8
Átøk sambært sáttmála ... 9
Kanning av fyrireikingartíðini á dagstovnaøkinum ... 9
Framtíðar átøk ... 10
Skeið og evnisdagar ... 10
Arbeiðsdagar saman við Pedagogfelagnum ... 10
Evnisdagur um setanarprógv ... 11
Skeið um nýggju dátuverndarlógina GDPR ... 11
Verkætlanir ... 12
Verkstova um starvsfólkatrotið á dagstovnaøkinum og á eldraøkinum ... 12
Netverk ... 13
Dagstovnaøkið ... 13
Starvsfólkaleiðarar ... 14
Flokkingar og umflokkingar ... 14
Gerðarrættarmál ... 14
Stuðul í forskúla ... 14
Uppsøgn av starvsfólki eftir lóg ... 15
Starvsaldur tá stig fella burtur ... 15
Endi ... 16
Viðtøkur fyri Kommunala Arbeiðsgevarafelagið ... 19

# Vælkomin

Góðu fundarfólk!

Eg vil bjóða tykkum øllum hjartaliga vælkomin á ársfund okkara í Kommunala Arbeiðsgevarafelagnum.



Í ársfrágreiðingini fari eg at siga frá virksemi felagsins í 2021.

Greitt verður frá gongdini í samráðingunum í undanfarna ári og fram til í dag.

Harumframt fari eg at vísa á nøkur av teimum mest týðandi evnum og málum, sum arbeitt varð við í undanfarna ári.

Hugt verður eisini frameftir og eftir teimum samráðingunum, sum eru fyri framman.

# Gongdin í sáttmálasamráðingunum í 2021

Fleiri av okkara sáttmálasamráðingum fyri tíðarskeiðið 2019 – 2021 endaðu í 2020.

Samráðingar fyri hetta tíðarskeiðið, sum hildu fram í 2021 vóru við Føroya Pedagogfelag, Føroya Handverkarafelag/Landsfelag Handverkaranna og Havnar Arbeiðarafelag.

Sáttmálarnir við Starvsfelagið og Heilsuhjálparafelagið gingu út 1. oktober 2021.

Kommunala Arbeiðsgevarafelagið hevur aftrat nevndu samráðingum samskift við feløg, sum vit havan serstaka avtalu við m.a. Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar og Fysio- og Ergoterapeutfelagið um viðurskifti, sum hava serligan týdning fyri kommunala sáttmálaøkið.

Greitt verður soleiðis frá gongdini í samráðingunum:

## Føroya Handverkarafelag / Landsfelag Handverkaranna

Sáttmálin við handverkarafeløgini er endurnýggjaður frá 1. oktober 2020 til 31. desember 2022.

Samráðingarnar við handverkarafeløgini gjørdust drúgvar - og endaðu við semingsuppskoti 11. mai 2021.

Stóra avbjóðingin í samráðingunum við handverkarafeløgini varð aftur hesa ferð at arbeiða við at javnstilla lønirnar hjá handverkarum settir í starv eftir sáttmála okkara við ávikavist Starvsfelagið og handverkarafeløgini. Kommunala Arbeiðsgevarafelagið, Fíggjarmálaráðið og handverkarafeløgini hava seinastu árini arbeitt miðvíst við at fáa eitt javnt lønarlag fyri handverkarar í almennari og kommunalari tænastu.

Av tíð at Starvsfelagið gjørdi semju við Fíggjarmálaráðið, áðrenn korona veruliga fór at gera um seg, meðan handverkarafeløgini komu seinni til samráðingarborðið og gjørdu semju mitt í korona - tíðarskeiðinum, hevði tað við sær, at lønarmunurin millum handverkararnar aftur fór skeiva vegin; Starvsfelagið fór avstað við eini hægri lønarhækkan enn onnur feløg í tíðarskeiðinum.

Fyri at finna eina loysn á lønarmuninum millum handverkarar á kommunala sáttmálaøkinum, hava partarnir gjørt semju um, at gera tað møguligt at viðgera avbjóðingina í sáttmálaskeiðinum, vit at seta inn tvær nýggjar ásetingar:

Í §3 um løn er sett inn soljóðandi stk. 6:

Arbeiðsgevarin kann, tá serligar umstøður gera seg galdandi, við handverkara avtala eina serliga persónliga flokking í eitt ávíst lønarstig. Flokkingin skal góðkennast av Kommunala Arbeiðsgevarafelagnum.

Nýggj §3a um starvsmetingarnevnd:

Partarnir eru samdir um at seta eina starvsmetingarnevnd, við tveimum umboðum fyri hvønn partin, soleiðis at Føroya Handverkarafelag og Landsfelag Handverkaranna hava hvør sítt umboð.

Uppgávan hjá nevndini er at útbyggja og eftirmeta lønarskipanina, umframt at viðgera øll flokkingarmál, ið verða reist av antin Kommunala Arbeiðsgevarafelagnum ella Føroya Handverkarafelag ella Landsfelag Handverkaranna.

Lønarhækkan:

1. januar 2021 2,05%
1. oktober 2021 1,25%

## Føroya Pedagogfelag

Sáttmálin partanna millum gekk út 1. oktober 2020, og partarnir vóru á fyrsta samráðingarfundi 8. oktober. Samráðingarnar hildu fram, tó nakað øðrvísið enn vanligt. Heldur enn at samráðast um nýggjan sáttmála ynskti Pedagogfelagið at hitta nýggju leiðsluna í Kommunala Arbeiðsgevarafelagnum at umrøða viðurskifti á dagstovnaøkinum, harímillum starvsfólkatrot og tíð til annað arbeiði.

Fyri Kommunala Arbeiðsgevarafelagið var tað umráðandi at fáa fram, at vit, sum felag ynsktu at arbeiða við at tryggja eina hægri fakligheit á dagstovnaøkinum. Starvsfólkatrot hevur merkt nógvar partar av arbeiðsmarknaðinum í 2021 – serliga hevur hendan støðan merkt kommunala dagstovnaøkið og eldraøkið. Tað hevur verið og er framvegis trupult, at fáa nokk av námsfrøðingum til dagstovnaøkið. Fyri at bøta um starvsfólkatrotið – og fyri at lyfta fakligheitina á dagstovnaøkinum

gjørdist tað eitt mál fyri felagið at arbeiða við at skapa trygg setanarviðurskifti fyri øll starvsfólk á dagstovnaøkinum, bæði fyri námsfrøðingar og hjálparfólk.

Nógv roynd hjálparfólk arbeiða á dagstovnaøkinum, starvsfólk, ið hava fakligheit gjøgnum drúgvar royndir og førleikamennandi skeið. Tað er okkara uppgáva framhaldandi at arbeiða við at menna starvsfólkini – og at skapa trygg setanarviðurskifti til øll, sum virka á økinum.

Fyri at fasthalda góðu starvsfólkini á dagstovnaøkinum, hevur tað stóran týdning alla tíðina at arbeiða við at betra um arbeiðsumstøðurnar. Kommunala Arbeiðsgevarafelagið og Pedagogfelagið samdust tí saman um at hyggja nærri at tilrættisleggjanini av arbeiðinum á kommunalu dagstovnunum. Avtalað varð at seta arbeiðsbólk at kanna, hvat kemur undir ásetingina "tíð til annað arbeiði" og, hvussu kommunurnar skipa hetta, hvør í sínum lagi. Greitt verður nærri frá hesum arbeiði seinni.

Samráðingarnar við Pedagogfelagið drógu út, serliga varð tað spurningurin um løn, men eisini hetta við skipanini av arbeiðinum á dagstovnunum, sum skilti partarnar. Tað varð so mikið langt millum partarnar, at semja varð um at boðsenda Semingsstovninum tann 10 mai. 2021.

Semingsstovnurin legði fyrsta semingsuppskotið fram hósdagin 20. mai 2021; partarnir vrakaðu semingsuppskotið. Síðani boðaði Pedagogfelagið tríggjar ferðir frá 24 tíma verkfalli fyri limir felagsins, ið arbeiddu á trimum ymiskum økjum, fyri síðani at boða frá verkfalli fyri allar limir felagsins 14. juni 2021. Eftir at hava gjørt Pedagogfelagið vart við, at aftaná ein arbeiðssteðg halda setanarviðurskiftini uppat, og at tað ikki ber til, at Pedagogfelagið einsamalt ger av, at hesi starvsfólk byrja aftur í starvi ein ávísan dag, lýstu Kommunala Arbeiðsgevarafelagið og Fíggjarmálaráðið við verkbanni. Á kommunala sáttmálaøkinum rakti verkbannið forskúlarnar kring landið, hetta frá 8. juni 2021.

Semingsstovnurin kallaði partarnar aftur til samráðingar leygardagin tann 19. juni, har semja millum partarnar loksins varð funnin, og verkbannið og verkfallið endaðu.

Semjan varð gjørd fyri tíðarskeiðið 1. oktober 2020 til 1. apríl 2023. Lønarhækkanin samsvarar við hækkanina, ið onnur feløg hava fingið og heldur seg innanfyri karmin.

Lønarhækkan:

- 1. januar 2021 2,05%
- 1. januar 2022 1,25% fyri lønarstigini 1-10
- 1. januar 2022 1,05% fyri lønarstigini 11-35

## Havnar Arbeiðarafelag

Kommunala Arbeiðsgevarafelagið skrivaði í 2019 undir serstakan sáttmála við Havnar Arbeiðarafelag um starvsfólk, sum arbeiða á Brennistøðini í Tórshavnar kommunu.

Sáttmálin fyri starvsfólkini á Brennistøðini byggir á høvuðssáttmálan millum Havnar Arbeiðarafelag og Føroya Arbeiðsgevarafelag. Hetta merkir m.a. at lønin og yvirskipaðu sáttmálaviðurskiftini hjá hesum starvsfólkum eru eftir høvuðssáttmálanum.

Serstaki sáttmálin er grundaður á serligu arbeiðsumstøðurnar hjá starvsfólkunum á Brennistøðini. Serásetingar eru gjørdar um lønina og arbeiðstíðina hjá starvsfólkunum, sum arbeiða á Brennistøðini, í evjusúgvingini.

Avtala er um, at fasta arbeiðstíðin er 40 tímar um vikuna, meðan løn verður goldin fyri 50 tíma viku. Lønin fyri 10 eyka tímarnar hvørja viku er lutvíst samsýning fyri at verða tøkur, meirarbeiði o.a.

Serstøk avtala er eisini um úrtíðararbeiði og tilkallivaktarskipan.

Havnar Arbeiðarafelag hevur sagt avtaluna upp – og samráðingar hava verið um at endurnýggja avtaluna í 2021, uttan úrslit.

Høvuðssáttmálin skal verða grundarlagið undir arbeiðsviðurskiftunum hjá hesum og øðrum limum í felagnum. Kommunala Arbeiðsgevarafelagið skal bert samráðast við Havnar Arbeiðarafelag um viðurskifti, sum eru serstøk fyri starvsfólkini í evjusúgvingini.

Høvuðssáttmálin, altso sáttmálin millum Havnar Arbeiðarafelag og Føroya Arbeiðsgevarafelag er tann sáttmálin, sum ásetur lønarhækkanina á økinum, meðan aðrar ásetingar í høvuðssáttmálanum, sum ikki eru ásettar í serstøku avtaluni eru útfyllandi fyri alt arbeiðið á økinum.

Samráðingarnar við Havnar Arbeiðarafelag verða tiknar upp aftur í samband við at sáttmálin við Føroya Arbeiðsgevarafelag gongur út 1. mai 2022.

## Havnar Arbeiðskvinnufelag

Havnar Arbeiðskvinnufelag hevur í fleiri umførum heitt á Kommunala Arbeiðsgevarafelag um at gera sáttmála fyri kommunalt sett starvsfólk í Tórshavnar kommunu.

Partarnir hava ikki altíð verið samdir um, at gera fastlønarsáttmála fyri starvsfólkini í Tórshavnar kommunu. Í 2021 hava partarnir tó samskift um og arbeitt miðvíst við at kanna møguleikarnar fyri at gera fastlønarsáttmála, ella at gera serstaka avtalu um at fylgja galdandi sáttmála hjá arbeiðskvinnufelagnum og Fíggjarmálaráðnum.

Havnar Arbeiðskvinnufelag ynskir fastlønarsáttmála fyri vaskifólki í skúlum, á dagstovnaøkinum og í eldrarøktini.

Tórshavnar kommuna tekur undir við, at Kommunala Arbeiðsgevarafelagið ger fastlønarsáttmála fyri nevndu øki. Tórshavnar kommuna ynskir at tryggja starvsfólkunum á økinum fasta setan, og harvið fasta løn og onnur viðurskifti, sum ein fastlønarskipan hevur við sær.

Umboð fyri Havnar Arbeiðskvinnufelag, Tórshavnar kommunu og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið hittust á vári 2021 fyri at umrøða støðuna. Partarnir samdust um, at arbeiðast skuldi víðari við at fáa vaskifólkini í kommununi inn í ein fastlønarsáttmála.

Avtala varð gjørd um, at Havnar Arbeiðskvinnufelag skuldi kunna sína limir um ætlanina við einum fastlønarsáttmála fyri kommunalu vaskifólkini. Aftaná kunningina hjá Havnar Arbeiðskvinnufelag skuldi Tórshavnar kommuna kunna samstarvsnevndina, álitisfólk o.o. í kommununi um ætlanirnar og mannagongdir og krøv í samband við at flyta starvsfólki í ein nýggjan sáttmála.

Havnar Arbeiðskvinnufelag hevur ikki vent aftur aftaná kunningina til limirnar; sostatt er eingin fastlønarsáttmáli gjørdur fyri vaskifólkini í Tórshavnar kommunu enn.

## Starvsfelagið – felags samráðingar saman við Fíggjarmálaráðnum

Kommunala Arbeiðsgevarafelagið og Fíggjarmálaráðið gjørdu av at hava felags sáttmálasamráðingar við Starvsfelagið, hóast partarnir hava sjálvstøðugar sáttmálar við Starvsfelagið.

Felags samráðingarnar byggja á rammuavtaluna, sum Kommunala Arbeiðsgevarafelagið og Fíggjarmálaráðið gjørdu endaliga semju um í august mánaði í 2021. Rammuavtalan leggur upp til samstarv á trimum høvuðsøkjum, harímillum um yvirskipað samstarv, samráðingar og um sáttmálaøki.

Undan samráðingunum við Starvsfelagið fyrireikaðu Kommunala Arbeiðsgevarafelagið og Fíggjarmálaráðið seg saman, ætlanir vóru lagdar um lønarkarm og um samstarvið í síni heild.

Kravhandanarfundur við Starvsfelagið varð tann 29. september 2021.
Útgangsstøði fyri samráðingunum varð, sum vanligt er, at partarnir lógu langt frá hvørjum øðrum, tá ræður um lønarhækkan.

Umframt lønarhækkan ynskti Starvsfelagið at gera broytingar í lønarbygnaðinum, at gera broytingar í lønartalvuni, sum høvdu kostnað við sær, sum fór út um avtalaða sáttmálaskeiðið.

Kommunala Arbeiðsgevarafelagið og Fíggjarmálaráðið gera ikki semju, sum gevur lønarhækkan út um sáttmálaskeiðið. Hendan støðan gjørdi tað trupult at fáa semju um sjálva lønarhækkanina.

Arbeitt varð víðari við viðurskiftum, sum kundu gerast ein partur av eini semju. Samráðingarnar gingu væl, semja varð um fleiri viðurskifti, men vit komu ikki ásamt um lønarkarmin fyri tíðarskeiðið.

Semja varð tí um at boðsenda Semingsstovnninum, sum kom upp í samráðingarnar síðst í november, semingin byrjaði tann 7. desember 2021.

Greitt verður nærri frá semingsuppskotinum niðanfyri.

### Heilsuhjálparafelagið

Samráðingarnar við Heilsuhjálparafelagið byrjaðu um sama mundi, sum samráðingarnar við Starvsfelagið, tann 27. september 2021. Partarnir hittust fleiri ferðir uttan, at nakað stórvegis spurdist burturúr – langt varð millum partarnar, bæði í mun til lønarkarm og onnur viðurskifti.

Tá semingin við Starvsfelagið byrjaði í desember í 2021, samdust Heilsuhjálparafelagið og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið um at bíða við víðari samráðingunum.

Tá samráðingarnar við Starvsfelagið endaðu, tann 13. januar 2022 – tóku vit samráðingarnar við Heilsuhjálparafelagið upp aftur, tó uttan úrslit.

Semingsstovnurin varð boðsendur – og semingin byrjaði tann 21. februar og endaði við semju longu dagin eftir 22. februar 2022.

Greitt verður nærri frá semingsuppskotinum niðanfyri.

## Sáttmálasamráðingar 2022 –

Samráðingarnar við Starvsfelagið og Heilsuhjálparafelagið halda fram í 2022. Greitt verður nærri frá semingsuppskotunum við ávikavist Starvsfelagið og Heilsuhjálparafelagið.

### Starvsfelagið

Kommunala Arbeiðsgevarafelagið, Fíggjarmálaráðið og Starvsfelagið tóku undir við semingsuppskoti, tann 13. januar 2022.

Sáttmálin bleiv endurnýggjaður fyri eitt 3 ára skeið frá 1. oktober 2021 til 30. september 2024.

Arbeiðsgevararnir høvdu eitt ynski um at halda somu lønarhækkan galdandi frá 1. januar 2022, sum onnur fakfeløg hava fingið fyri sama tíðarskeið.

Starvsfelagið ynskti at lyfta starvsfólkini á lægru lønarstigunum. Hesi starvsfólk fáa tí eina hægri krónuupphædd 1. oktober 2022.

**Lønarhækkanin fyri 3 ára sáttmálaskeiðið er:**

- Tann 1. januar 2022 hækka lønirnar 1,25%
- Tann 1. oktober 2022 hækka lønirnar á lønarstigunum 1-20 við kr. 740 og á lønarstigunum 21-50 við kr. 540.
- Tann 1. oktober 2023 hækka lønirnar 2,75%

Broytingar í sáttmálanum, sum eru serligar fyri kommunala sáttmálaøkið eru m.a. tillagingar í § 5 um fyribilsstørv og avloysarar, § 10 um frítíð, § 26 um eykagjøld á SEV, § 29 um sjálvboðið arbeiði og § 14 um praktikantar.

Millum broytingar, sum eru nýggjar – og sum hava serligan týdning kunnu nevnast eru viðv.:

**§ 20 um sløkkiliðsfólk**
Vaktargjaldið til sløkkiliðsfólk fer úr 18% upp í 24% í sáttmálaskeiðinum.

Sáttmálapartarnir hava avtalað at hyggja at vaktarskipanini hjá sløkkiliðsfólkum, harundir innihaldinum í arbeiðinum í vaktini.

Partarnir seta arbeiðsbólk at kanna um vaktarskipanin og samsýningin til sløkkiliðsfólk er tíðarhóskandi.

Broytingar eru eisini gjørdar í § 22 um yvirtíð, sum koma í gildi fyri starvsfólk, sum eru á stig 28 og hægri. Tað skal verða truplari at rokna yvirtíð – og fyrstu 20 áløgdu yvirtíðartímarnir hvønn ársfjórðingin eru partur av vanligu lønini.

Avtala er eisini gjørd um onnur felags tiltøk, sum greitt er frá undir átøk sambært sáttmála.

## Heilsuhjálparafelagið

Kommunala Arbeiðsgevarafelagið og Heilsuhjálparafelagið tóku undir við semingsuppskoti, tann 22. februar 2022.

Sáttmálin bleiv endurnýggjaður fyri eitt 3 ára skeið frá 1. oktober 2021 til 30. september 2024.

Arbeiðsgevararnir høvdu eitt ynski um at halda somu lønarhækkan og sáttmálaskeið, sum fyri Starvsfelagið.

Sáttmálin verður endurnýggjaður fyri tíðina frá 1. oktober 2021 til 1. oktober 2024.

- Tann 1. januar 2022 hækka lønirnar 1,25%
- Tann 1. oktober 2022 hækka lønirnar við kr. 710
- Tann 1. oktober 2023 hækka lønirnar 2,5%

Bæði heilsu- og/ heimahjálparar fáa eitt nýtt endastig, og harvið eina hægri endaløn.

Kostnaðurin av nýggjum endastigunum verður goldin av lønarhækkanini 1. oktober 2022 og 2023.

Avtala er eisini gjørd um at gera eina kanning á eldraøkinum, har vit m.a. skulu kanna møguleikan fyri at seta heilsu- og/ heimahjálparar í hægri ella fullan starvsbrøk.

## Fysio- og Ergoterapeutfelagið

Kommunala Arbeiðsgevarafelagið hevur serstaka avtalu um at fylgja sáttmálanum, sum Fysio- og Ergoterapeutfelagið hava við Fíggjarmálaráðið; sáttmálin verður brúktur á eldraøkinum. Seinastu árini hava vit havt stórar avbjóðingar við at lønin hjá deildarleiðarum, sum eru fysio- og ergoterapeutar hevur ligið væl lægri enn lønin hjá deildarleiðarum, sum eru sjúkrarøktarfrøðingar.

Kommunala Arbeiðsgevarafelagið hevur fylgt samráðingunum millum Fíggjarmálaráðið og feløgini, men vit hava ikki luttikið í sjálvum samráðingunum. Umboð fyri Kommunala Arbeiðsgevarafelagið luttók á síðsta fundinum partanna millum, tá semja eisini varð undirskrivað tann 28. januar 2022.

Semja er um, at leiðandi fysio- og ergoterapeutar á kommunala sáttmálaøkinum verða flokkaðir á stig 30. Soleiðis verða leiðandi terapeutarnir lyftir upp á eitt støði, sum er meira hóskandi fyri leiðandi starvsfólk á økinum.

Starvsfólkini fylgja tí til eina og hvørja tíð galdandi sáttmála á økinum

## Aðrir sáttmálar

Fleiri av okkara sáttmálum ganga út í oktober í 2022, harímillum sáttmálarnir við Danska Tannlæknafelagið, Føroya Handverkarafelag/Landsfelag Handverkaranna, Føroya Skipara- og Navigatørfelag, Heilsurøktarafelagið, Maskinmeistarafelagið og Føroya Arbeiðarafelag um dagrøktarar. Haraftrat eru tað serstakar avtalur, sum skulu endurnýggjast m.a. við Havnar Arbeiðarafelag.

Sáttmáli okkara við Føroya Pedagogfelag gongur út í apríl í 2023.

# Korona

Í samband við koronafarsóttina hevur tørvur verið á vegleiðingum í mun til starvsfólkaviðurskifti. Vegleiðingarnar hava verið í trá við almennu tilmælini, sum oftani hava verið broytt seinasta árið og tískil hava fleiri tillagaðar vegleiðingar sendar út til kommunur, SEV og IRF. Hóast vegleiðingar hava verið gjørdar javnan hevur verið ógjørligt at tikið hædd fyri øllum teimum mongu tvístøðunum, ið hava tikið seg upp undir koronafarsóttini.

Vegleiðingarnar hava gjørt greitt, hvussu farast skal fram, alt eftir, hvussu starvsfólkini eru sett, tá tímalønt ikki hava somu rættindi sum fastlønt.

Eisini varð vegleiðing gjørd í mun til feriu og privata ferðing hjá starvsfólkunum. Mælt varð til, at kommunalu arbeiðsgevarnar kunnaðu og gjørdu greiðar avtalur við starvsfólk um feriu og ferðing uttanlands í mun til korona soleiðis, at starvsfólk vóru greið um, at tey átti leggja uttanlandsferðing í privatørindum til rættis soleiðis, at tey kunnu møta aftur til arbeiðis eftir feriuna, eftir at úrslitið frá koronakanningini var tøkt. Í hesum sambandi hava fakfeløgini víst á teirra misnøgd í mun til, at arbeiðsgevarar hava blandað seg ov nógv í feriuna hjá starvsfólki.

Á heysti 2021 vórðu nógv børn annaðhvørt sett í sóttarhald ella smittaði við korona. Hetta viðførdi, at dagstovnar og skúlar máttu stongja í styttri ella longri tíðarskeið. Foreldur ella umsorganarpersónar

hvørs børn vóru í sóttarhaldi ella vóru sjúk kundi verða heima hjá barninum við løn um ikki aðrir møguleikar vóru. Í teimum førum tað bar til átti arbeiðsgevarin at umleggja vaktir, soleiðis at starvsfólk kundi møta til arbeiðis, tá annar umsorganarpersónur kundi verða um børnini. Eisini varð mælt til, at foreldur og umsorganarpersónar arbeiddu heimanífrá í tann mun tað bar til.

Eftir at serligu ásetingarnar í dagpengalógini vórðu settar úr gildi 15. februar 2022, sum merktu, at starvsfólk aftur verða fevnd av vanligu reglunum um dagpening og løn undir sjúku, varð avgjørt 8. februar 2022, at koronavegleiðingarnar hjá Kommunala Arbeiðsgevarafelagnum verða broyttar samsvarandi. Tað vil siga, at 15. februar 2022 varð farið aftur til vanligu ásetingarnar í sáttmála um løn undir sjúku, og løn í samband við fráveru, tá børn eru sjúk.

Tilmælini um sóttarhald vórðu somuleiðis broytt tann 15. februar 2022 til, at tað bert er tann smittaði, ið skal í sóttarhald. Landsstýrið ætlar sostatt, at føroyingar fara aftur til ein vanliga gerandisdag og tískil verða koronuvegleiðingarnar, sum Kommunala Arbeiðsgevarafelagið hevur sent út, settar úr gildi.

# Átøk sambært sáttmála

## Kanning av fyrireikingartíðini á dagstovnaøkinum

Semja varð í 2020 gjørd millum Kommunala Arbeiðsgevarafelagið og Føroya Pedagogfelag um at lýsa verandi skipanir, ið koma undir § 10 í sáttmálanum. § 10 er tíð til annað arbeiðið, sum eisini verður nevnt fyrireiking og eftirmeting av pedagogiska arbeiðinum á dagstovnaøkinum.

Uttanveltaðir ráðgevarar eru settir at gera kanningina, eitt kanningartoymi mannað við Onnu Sofíu Veyhe, PhD, ass. professari og MA í fólkaheilsu, Gitte Klein, cand. psych. og MA í positivari sálarfrøði og Hjørdis Gaard, cand. scient. pol. og pgd. í leiðslu.

Kanningin er farin av bakkastokki seinast í november 2021, og er kanningin bæði kvantitativ og kvalitativ. Kvalitativa kanningin er skipað við verkstovum við tilvildarliga útvaldum fokusbólkum fyri m.a., at bólka og nágreina ymsu uppgávurnar á dagstovnaøkinum ; ein fokusbólkur fyri dagstovnaleiðarar og tveir fokusbólkar við námsfrøðingum og hjálparfólkum. Í kvantitativu kanningini verða spurnarskema send til allar dagstovnaleiðarar í Føroyum og til 500 tilvildarliga útvaldar námsfrøðingar og hjálparfólk. Í spurnarskemanum er ein røð av spurningum og ein uppgávu- og tíðarskráseting. Uppgáva- og tíðarskrásetingin verður skipað soleiðis, at tey, sum luttaka í kanningini, verða biðin um at skráseta teirra uppgávur regluliga gjøgnum dagin yvir 3 arbeiðsdagar.

Ætlanin var, at kvalitativa kanningin átti at fara fram í seinnu hálvu av januar 2022 í vøggustovum, barnagørðum og frítíðarskúlum, men varð útsett vegna koronu. Dagstovnarnir eru so mikið ávirkaðir av koronu, at gerandisdagurin í stóran mun ikki kann metast sum vanligur, og er hetta ein fortreyt fyri, at kanningin kann geva eina realistiska mynd av støðuni.

Kanningin verður handað fylgibólkinum, sum ger tilmælið um, hvussu arbeiðið kann skipast framyvir. Í fylgibólkinum eru tvey umboð fyri hvønn part. Ann Hansen, eindarleiðari í Tórshavnar kommunu og Bina Reginsdóttir, fulltrúi eru umboð fyri Kommunala Arbeiðsgevarafelagið og Annika Østerø og Maika L. Samuelsen, ið báðar eru námsfrøðingar fyri Føroya Pedagogfelag. Fylgibólkurin hevur leypandi støðufundir við ráðgevaratoymið, meðan kanning verður gjørd.

Tilmælini verða løgd fram á einum felags evnisdegi.

## Framtíðar átøk

Kommunala Arbeiðsgevarafelagið hevur í semjuni við Starvsfelagið gjørt avtalu um fleiri felags átøk.

**Átak um førleikamenning**
Avtala er gjørd við Starvsfelagið um at skipa fyri felags evnisdegi, har ljós verður varpað á tøkniligu frambrotini, sum Talgilding Føroya hevur staðið fyri við menningini av talgildum tænastum. Harundir um avleiðingarnar tøkniliga menningin hevur havt á arbeiðið hjá alment og kommunalt settum starvsfólkum.
Ljós skal varpast á møguleikan hjá arbeiðsgevarum at seta í verk førleikamenning, m.a. tá starvsfólk hava tørv á upplæring og dagføring fyri frameftir at umsita tøkniligu skipanirnar o.a.

**Átak viðv. vaktarskipanini á Sløkkiliðsstøðini**
Partarnir eru samdir um at hyggja at vaktarskipanini hjá sløkkiliðsfólkum og innihaldinum í arbeiðinum í vaktini.

Hyggjast skal eisini at samsýningini, metast skal um hendan er tíðarhóskandi.

Arbeiðsbólkur við umboðum frá sáttmálapørtunum verður settur at kanna vaktararbeiðið hjá sløkkiliðsfólkunum. Arbeiðið byrjar í september 2022 og skal verða liðugt á sumri 2023.

**Átak viðv. setanarviðurskiftunum hjá heilsu-og/heimahjálparum**
Kommunala Arbeiðsgevarafelagið og Heilsuhjálparafelagið hava eisini avtalu um, at kanna setanarviðurskiftini hjá heilsu-og/heimahjálparum, sum starvast á eldraøkinum. Kannast skal um grundarlag er fyri at seta heilsu-og/heimahjálparar í starv við hægri- ella fullum setanarbrøki.
Skipast skal síðani fyri felags evnisdegi, har ljós skal varpast á setanarviðurskiftini og fakligheitina hjá starvsfólkunum, sum arbeiða á eldraøkinum.

# Skeið og evnisdagar

Á hvørjum árið verður skipað fyri skeiðum, evnisdøgum og sáttmáladøgum.

Hetta virksemið hevur verið nógv niðurlagað grundað á koronustøðuna, tó so, so hava vit havt nøkur tiltøk m.a. kann vísast til arbeiðsdagarnar saman við Pedagogfelagnum.

## Arbeiðsdagar saman við Pedagogfelagnum

Undir samráðingunum millum Kommunala Arbeiðsgevarafelagið og Pedagogfelagið í 2020 varð nógv tosað um trot av arbeiðsmegi á dagstovnaøkinum. Pedagogfelagið ynskti at viðgera hesa avbjóðingina saman við arbeiðsgevarunum, áðrenn samráðingarnar byrjaðu.
Partarnir avtalaðu at arbeiða víðari við hesum evninum, og skipað varð fyri felags arbeiðsdøgum um støðuna á dagstovnaøkinum í apríl 2021.

Arbeiðsdagarnir skuldu síggjast, sum ein liður í komandi sáttmálasamráðingunum við Pedagogfelagið. Niðanfyri síggjast spurningar og hugleiðingar, sum vóru til umrøðu:

1. Hvørjar avbjóðingar síggja vit á stovnsøkinum?
2. Hvørjar framtíðarmyndir og loysnir kunnu verða til hesar avbjóðingar?

- Hvussu fáa vit eina burðardygga loysn í mun til starvsfólkatrotið á stovnsøkinum bráðfeingis og í framtíðini?
- Hvussu fáa vit fleiri at leita til og støðast á stovnsøkinum?
- Hvussu kann gerandisdagurin skipast á stovnsøkinum, so børn/ung, starvsfólk og leiðarar trívast og mennast?

Samanumtikið góðir og gevandi arbeiðsdagar, sum geva gróðrarbotn fyri framtíðar samstarvi.

## Evnisdagur um setanarprógv

Í mai mánaði í 2021 skipaði Kommunala Arbeiðsgevarafelagið fyri evnisdegi um lógina um skyldu arbeiðsgevarans at fráboða løntakarunum treytirnar fyri setanarviðurskiftunum.

Endamálið við degnum var at gera arbeiðsgevarar varugar við ásetingarnar í lógini, og at minna á týdningin av, at starvsfólk fáa eitt setanarbræv, sum ásett í lógini og í sáttmálum okkara á kommunala arbeiðsmarknaðinum.

Lógin ásetur, at øll, sum eru sett í starv í meira enn ein mánað, og sum í miðal arbeiða meira enn 8 tímar um vikuna, skulu hava setanarprógv. Løntakarin skal hava setanarprógv í seinasta lagi ein mánað eftir, at setanin er byrjað.

Flestu okkara sáttmálar hava ásetingar um, at starvsfólk skulu hava eitt setanarprógv í samband við setan, og í seinasta lagi 14 dagar eftir setan.

Seinastu árini hava vit sæð fleiri og fleiri mál, har starvsfólk ikki hava fingið eitt setanarprógv, ella at starvsfólk hava fingið eitt ófullfíggjað setanarprógv. Í slíkum førum verða málini fyrst viðgjørt millum avvarðandi partar. Finna partarnir ikki semju, so kunnu starvsfólk senda kæru til Vinnukærunevndina, sum hevur heimild at taka støðu til, um lógin er brotin.
Har sáttmálar okkara hava ásetingar um setanarprógv, har skulu møgulig mál avgerast í arbeiðsrættarligu skipanini, altso í Fasta Gerðarrætti.

Har lógarásetingarnar eru meira víttfevnandi enn ásetingarnar í sáttmálum okkara, er tað ásetingarnar lógini, sum eru galdandi.

## Skeið um nýggju dátuverndarlógina GDPR

Nýggja dátuverndarlógin setur krøv um m.a., hvussu kommunurnar, sum arbeiðsgevarar og myndugleikar skulu handfara persónsupplýsingar.

Talan er um nýggja lóggávu, sum leggur upp til nýggjar mátar at handfara persónsupplýsingar, serliga viðkvæmar persónsupplýsingar. Av tí at talan er um nýggja lóggávu, so mettu vit tað hava týdning at bjóða kommunalum starvsfólkum frálæru í teimum grundleggjandi hugtøkunum í dátuverndarlógini, umframt at geva luttakarunum vegleiðing og praktisk amboð til at fyrireika kommununa til nýggju lógarkrøvini.

Lógin ásetur m.a. reglur um vernd av einstaklingum í sambandi við viðgerð av persónsupplýsingum, og reglur um frían flutning av persónsupplýsingum.

Umráðandi er at leggja sær í geyma, at persónsupplýsingar bert skulu savnast til nágreiniliga tilskilað og heimilað endamál. Innsavnaðir persónsupplýsingar kunnu ikki frítt víðarigevast til onnur endamál enn tað tey, sum persónsupplýsingarnar vóru savnaðir til.

At endamálið við savnan av persónsupplýsingum skal verða heimilað hevur við sær, at ein arbeiðsgevari ella myndugleiki kann savna persónsupplýsingar við tí endamáli at røkja ella at loysa uppgávur, sum liggja innanfyri virkisøkið hjá arbeiðsgevaranum ella myndugleikanum.

**Meginreglur, sum skulu haldast í samband við viðgerð av persónsupplýsingum**

- Viðgerðin skal verða lóglig, rímilig og gjøgnumskygd
- Tað skulu gerast rættar og nøktandi dagføringar av persónsupplýsingunum
- Tað skal verða eitt nágreiniligt tilskilað og heimila endamál við viðgerðini
- Persónsupplýsingarnar skulu ikki goymast longri enn neyðugt
- Viðgerðin skal verða nøktandi, viðkomandi og avmarkað
- Viðgerðin av persónsupplýsingunum skal verða trygg

# Verkætlanir

## Verkstova um starvsfólkatrotið á dagstovnaøkinum og á eldraøkinum

Kommunufelagið hevur gjørt landsstýrið vart við starvsfólkatørvin á eldra- og dagstovnaøkinum – og hevur sett ynski fram um ein tvørgeiraligan arbeiðsbólk at gera eina ætlan fyri, hvussu bøtast kann um trupulleikarnar.  Mentamálaráðið (MMR) verður biðið um at standa fyri arbeiðinum og setti MMR ein stýrisbólk, ið er mannaður við aðalstjórunum fyri MMR, Almannaráðið og Fíggjarmálaráðið umframt stjórunum fyri Kommunufelagið, Almannaverkið og Sjúkrahúsverkið.

<u>Arbeiðssetningur hjá stýrisbólkinum:</u>
Endamálið við arbeiðinum varð at koma við samskipaðum boðum uppá, hvussu avbjóðingarnar við stóra starvsfólkatørvinum á røktar- og námsfrøðiøkjunum komandi 10 árini, innan eldra, heilsu, almanna og dagstovnaøkið, kunnu nøktast.

At lýsa avbjóðingarnar innan ymsu økini og møguligar loysir, sum kunnu umfata útbúgvingar, arbeiða øðrvísi, umskipa tilgongdina, tileggjan og meta um fíggjarligu kostnaðin v.m.
Ein samlað frágreiðing skuldi leggjast fram í januar 2022.

Stýrisbólkurin skipaði fyri verkstovum har arbeitt var í tvørfakligum bólkum við tveimum evnum í part, har tey eisini skuldu viðgera framløgur. Endamálið varð at skapa kjak og festa hugskot í yvirskipaðum formi niður á blað. Hetta er ikki at meta sum ein endaligur listi, men hugskotið er at fáa so nógv sum gjørligt skjalfest og at gagnnýta møguleikan fyri tvørfakligum samstarvi og samstarvi millum stovnar og ráð.

Til tess at tryggja, at arbeiðið ber á mál, er arbeiðið skipað í fýra tvørfakligum bólkum. Arbeiðið hjá hesum bólkum er at skipa og skriva tekstirnar til hugskotini innan teirra øki. Fýra bólkar verða skipaðir, ið arbeiða við:

1. Strukturell umskipan
2. Fyribyrging og rættstundis innsatsur
3. Umskipan og útveiting av uppgávum
4. Útbúgving og menning av førleikum

Kommunala Arbeiðsgevarafelagið luttekur í bólki 4 og hevur m.a. víst á, at tørvur er á at endurskoða heilsuhjálparaútbúgvingina til nútíðartørv á eldraøkinum, umframt at skipað verður fyri, at ein flokkur til heilsuhjálparar/røktarar verður boðin út norðanfjørðs. Harumframt mælir Kommunala Arbeiðsgevarafelagið til, at ein flokkur verður boðin út til tilflytarar bæði innan námsfrøðihjálpara útbúgvingina og heilsuútbúgvingarnar. Vit mæla eisini til, at skipað verður fyri at førleikamenna

hjálparfólk á dagstovnaøkinum, meðan tey eru til arbeiðis t.d. við at bjóða undirvísing tveir seinnapartar um vikuna við løn. Mett verður, at nóg nógvir tilflytarar longu starvast á dagstovnaøkinum til ein flokk til førleikamenning.

Endaliga arbeiðið, sum verður lagt fyri landsstýrið og politikarar, verður at meta sum ein hugskotsskrá. Tað vil siga, at hugskotini, sum kunnu tæna endamálunum, skulu laða uppundir samlaðar loysnir. Hesar kunnu vera meira ella minni fløktar og størri ella minni í vavi, men tað er umráðandi, at so nógv verður viðgjørt, greinað og lagt fram sum gjørligt.

Frágreiðingin er liðug - og send avvarðandi pørtum.

# Netverk

## Dagstovnaøkið

Endamálið við netverkinum er faklig sparring og vitanardeiling millum leiðarnar/ábyrgdarpersónar í einstøku kommununum umframt at Kommunala Arbeiðsgevarafelagið og Kommunufelagið ynskir eitt tættari samband við dagstovnaøkið.

Fundur í dagstovnanetverkinum eru einaferð um kvartalið og hava sostatt fýra fundir verið í 2021. Í dagstovnanetverkinum eru sum sagt yvirskipaða leiðslan á dagstovnaøkinum og eru hesar kommunur umboðaðar: Vága kommuna, Klaksvíkar kommuna, Eystur kommuna, Fuglafjarðar kommuna, Sunda kommuna og Tórshavnar kommuna.

Luttakarar á fundinum avgera í mesta mun sjálvir, hvat er á skrá til fundirnar, men um eitthvørt viðkomandi er so sum sáttmálasamráðingar og úrskurðar í Fasta Gerðarrætti, so setur Kommuna Arbeiðsgevarafelagið mál á skrá eisini.

Korona hevur verið á skrá á hvørjum fundi í dagstovnanetverkinum. Tørvur hevur verið leypandi at tosa um loysnir og møguleikar skipanarliga á økinum og hvørji ráð eru at taka til, tá korona hevur rakt starvsfólk, foreldur og børn. Koronatíðin hevur verið eyðkend fyri tvístøður, ið hava tikið seg upp, tá t.d. foreldur ikki vilja lata børnini kanna, áðrenn tey aftur koma á stovn og í heila tikið tá starvsfólk/foreldur hava gingið ímóti almennu tilmælunum.

Afturvendandi avbjóðingin í dagstovnalógini § 5 hevur eisini verið umrøddur í 2021. Við millumbilum vera einstøk ivamál tikin upp við Almannaverkið, um børn sum eru í so stórum avbjóðingum, at viðkomandi kommuna metir, at Almannaverkið eigir at veita serligt dagstovnatilboð. Í heilt fáum av hesum førunum hevur Almannaverkið tikið undir við kommununum og tikið ábyrgd av at veita serligt dagtilboð. Í flestu førum er avgerðin, at kommunurnar eiga uppgávuna og sum oftast hava kommunurnar verið sera ivasamar um avgerðin er í trá við § 5 í dagstovnalógini.

Starvsfólkatrot á dagstovnaøkinum rakar nærum allar kommunur. Ein avleiðing er, at dagstovnar nakrar dagar hava skert virksemi. Skert virksemið kann merkja broyttar upplatingartíðir og at foreldur verða biðin um at heinta børnini fyrr. Eisini er neyðugt at raðfesta uppgávurnar á stovnunum, sum kann merkja, at ikki ber til at fremja upprunaligu ætlanirnar t.d. við evnisvikum og øðrum.

Mentamálaráðið skal veita kommununum ráðgeving og vegleiðing í námsfrøðiligum spurningum. Nýtt starvsfólk er sett fyri Hildur Paturson í mentamálaráðnum, sum er farin frá vegna aldur og hevur røkt hetta starvið í mong ár. Í hennara stað er Høgni Warberg settur og hevur hann verið við á dagstovnanetverksfundi og heilsa uppá.

## Starvsfólkaleiðarar

Kommunala Arbeiðsgevarafelagið hevur síðani 2020 skipa fyri regluligum fundum fyri starvsfólkaleiðarar á kommunala sáttmálaøkinum. Talan er um eitt netverk fyri starvsfólkaleiðarar í størstu kommununum í Føroyum og á SEV og IRF.

Endamálið við netverkinum er at skapa eitt forum, har møguleiki er saman at viðgera viðkomandi viðurskiftir, sum eru serstøk á starvsfólkaøkinum, og annars at vitanardeila og sparring um viðurskifti av felags áhuga.

Millum mál, sum hava verið til umrøðu, kunnu nevnast: Sáttmálasamráðingar, flokking- og umflokking av starvsfólki, fasthaldan av starvsfólki, lønarskipanir, HR-skipanir, fráfaringaraldur o.a.

# Flokkingar og umflokkingar

Øll størv, sum ikki frammanundan eru flokkaði, eiga at verða flokkað, áðrenn tey verða lýst leyst alment.

Ein møgulig flokking, sum ikki greitt er ásett í einum galdandi sáttmála, krevur sambært § 5, stk. 5 í kommunustýrislógini góðkenning av landsstýrismanninum í fíggjarmálum.

Tað er Kommunala Arbeiðsgevarafelagið, sum samráðast um sáttmálar og lønir á kommunala arbeiðsmarknaðinum, tí eiga allar flokkingar og avtalur um løn- og setanarviðurskifti á kommunala arbeiðsmarknaðinum at verða sendar felagnum. Tað er týdningarmikið, at kommunurnar og interkommunalu arbeiðsgevararnir venda sær til Kommunala Arbeiðsgevarafelagið við umbønum, um at fáa ávís størv flokkað og góðkend í samsvari við ásetingarnar í kommunustýrislógini.

Vanliga mannagongdin er, at arbeiðsgevararnir senda umbønirnar, um at fáa størv flokkað til felagið, sum síðani tekur tað upp við avvarðandi fakfelag, og so verður møgulig umbøn um góðkenning staðfest av kommunala Arbeiðsgevarafelagnum ella send Fíggjarmálaráðnum til góðkenningar.

Kommunala Arbeiðsgevarafelagið hevur latið gera vegleiðing um, hvussu kommunurnar og interkommunalu arbeiðsgevararnir skulu fyrihalda seg – og hvørjar upplýsingar skulu fáast til vega í samband við flokkingar- og umflokkingar av starvsfólkum á kommunala sáttmálaøkinum. Vegleiðingina finna tit á heimasíðu felagsins á www.kaf.fo

# Gerðarrættarmál

## Stuðul í forskúla

Í juli 2020 kærir Føroya Pedagogfelag Kommunala Arbeiðsgevarafelagið til Fasta Gerðarrættin um trætu um hugtakið "stuðul" í forskúla.

Pedagogfelagið meinar, at hugtakið "stuðul" ikki er galdandi í sáttmálanum millum partarnar - og um so er, at námsfrøðingur verður settur í forskúlan, so er ein flokking av námsfrøðingum í forskúla galdandi frá juni 2014.

Kommunala Arbeiðsgevarafelagið meinar hinvegin, at námsfrøðingar settir sbrt. kunngerðini um forskúlar eru forskúlanámsfrøðingar, sum saman við læraranum skipa, leggja til rættis og standa fyri undirvísingini í forskúlanum; talan er tá ikki um stuðlar.

*Forskúlanámsfrøðingar*

verða løntir á lønarstigunum 13, 15, 17, 19 og 21 og fylgja hesir arbeiðstíðini hjá lærarunum. Sí serskild semja frá 17. juni 2014."

Stuðlar hinvegin eru settir til børn við serligum tørvi. Um eitt barn hevur serliga tørv í forskúlanum og hevur tørv á stuðli fyri at verða partur av forskúla flokkinum, verður umsókn latin inn til kommununa um tímar til eitt ávíst barn. Stuðul verður síðani settir samsvarandi tímarnar, ið verða játtaðir til barnið. Kommunala Arbeiðsgevarafelagið metir ikki, at stuðlar eiga at verða settir sbrt. forskúlaflokkingini, men sum vanligir námsfrøðingar/hjálparfólk. Siðvenja er á økinum, at stuðlar verða settir í forskúlanum sum vanligir námsfrøðingar/hjálparfólk.

Sbrt. § 3 í sáttmálanum er ásett, at:

Pedagogar verða løntir á lønarstigunum 11, 13, 14, 16, 17, 19, 21 og 22.

Kommunala Arbeiðsgevarafelagið letur seg umboða av advokati, Gunn Ellefsen og tilfar er innsavnað frá kommunum m.a. hvussu stuðlar eru settir, hvussu tímar verða játtaðir, hvat innihald er í stuðuls starvinum.

Fasti Gerðarrættur hevur gjørt úrskurð í gerðarrættarmálinum í oktober 2021, at stuðlar verða settir í starv í forskúlum, sum vanligir námsfrøðingar á dagstovnaøkinum, og verða ikki settir í starv sambært forskúlakunngerðini, eins og forskúlanámsfrøðingurin.

Ein samdur Gerðarrættur frídømdi Kommunala Arbeiðsgevarafelagið.

## Uppsøgn av starvsfólki eftir lóg

Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar hava boðað Kommunala Arbeiðsgevarafelagnum frá, at tey fara at koyra eitt mál um uppsøgn eftir 120 daga regluni í Fasta Gerðarrætt til støðutakan, um vit ikki semjast um aðrar loysn á málinum. Málið er ikki lagt fyri Fasta Gerðarrættin enn, men er ávegis.

Málið snýr seg um, at eitt starvsfólk á eldraøkinum, sum eisini er álitisfólk - og er sagt úr starvi eftir 120 daga regluni. Starvsfólkið verður uppsagt eftir starvsmannalógini við styttari uppsagnarfreist á 1 mánað vegna sjúku. Starvsfólkið er ikki uppsagt í síni funktión, sum álitisfólk eftir sáttmála – og fekk tí ikki 3 mánaðir eyka uppsagnartíð eftir sáttmála fyri sín leiklut, sum álitisfólk.

Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar finst ikki at uppsøgnini, sum er grundað á sjúku, har starvsfólkið hevur verðið burtur frá starvi sínum í 120 dagar innanfyri eitt tíðarskeið á 12 mánaðir. Hinvegin vísur felagið hjá sjúkrarøktarfrøðingunum á, at starvsfólkið er álitisfólk, og meinar at starvsfólkið skal hava 3 mánaðir eyka uppsagnartíð eftir galdandi sáttmála.

Kommunala Arbeiðsgevarafelagið er av aðrari fatan; vit meina, at talan er um uppsøgn, sum er grundað á starvsmannalógina, og ikki á sáttmála.

Kommunala Arbeiðsgevarafelagið meinar, at málið skal roynast í Fasta Gerðarrætti.

## Starvsaldur tá stig fella burtur

Pedagogfelagið hevur kært Fíggjarmálaráðið til Fasta Gerðarrættin viðv. einum máli um innvinning av starvsaldri í samband við, at lønarskalin hjá námsfrøðingar í semju partanna millum varð broyttur í 2018.

Av tí, at sáttmálin fyri námsfrøðingar er ein felags sáttmáli fyri alment og kommunalt sett starvsfólk, so hevur eitt mál mótvegis Fíggjarmálaráðnum beinleiðis ávirkan á kommunala sáttmálaøkið, tí kunna vit tykkum um hesa fyriliggjandi tulking av sáttmála okkara.

Seinastu árini eru gjørdar nógvar broytingar í lønarskalanum hjá námsfrøðingum, broytingarnar hava í fleiri førum havt til endamáls at stytta um tíðina hjá námsfrøðingum at koma á endastig, hetta við at stytta skalagongdina.

Hetta ítøkiliga málið byggir á semjuna frá 14. januar 2018, har lønarstig fella burtur í skalagongdini frá 1. oktober 2019. Ósemjan partanna millum stendst í, hvussu starvsfólk, sum standa á teimum lønarstigunum, sum fella burtur skulu flyta víðari á næsta lønarstig.

Pedagogfelagið førir fram, at starvsfólk, sum standa á einum stigi, sum fellur burtur skal hava við sær fullan starvsaldur, tá starvsfólkið flytur á næsta hægra stigið. Hetta skal skiljast soleiðis, at tíðin starvsfólkið kemur at standa á nýggja/hægra stiginum verður styttri enn 24 mánaðir, har sáttmálin okkara millum annars ásetur, at starvsfólk skulu standa 2 ár á hvørjum stigi, sí § 5, stk. 1.

Kommunala Arbeiðsgevarafelagið og Fíggjarmálaráðið eru samd um, at fella stig burtur í einum lønarskala, tá flyta starvsfólk á nýggja/hægra stigið, sum avtalað í semjuni/sáttmálanum, men treytirnar í sáttmálanum viðv. innvinning av starvsaldri skulu fylgja tí til eina og hvørja tíð galdandi sáttmála, í hesum føri § 5, stk. 1, har tað stendur “starvsaldur er 2 ár á hvørjum lønarstigi”.

Kommunala Arbeiðsgevarafelagið stuðlar Fíggjarmálaráðnum í nevnda máli.

## Endi

Kjarnin í arbeiði okkara er at samráðast – og at ráðgeva og vegleiða kommununum, SEV og IRF í starvsfólkamálum, sáttmálaviðurskiftum og øðrum arbeiðsmarknaðarmálum. Soleiðis, varð arbeiðið okkara í 2021 á mangar mátar ikki øðrvísi enn onnur ár. Tó skal sigast, at korona hevur merkt okkara arbeiði rættiliga nógv; vit hava ikki í líka stóran mun verið úti um okkum við kunnandi tiltøkum, sáttmáladøgum o.l. Hinvegin, so hevur nógv vegleiðing verið í mun til koronu - og um, hvussu arbeiðsgevarar skulu fyrihalda seg til ymiskar støður m.a. í samband við løn, tá starvsfólk eru í sóttarhaldi, ella tá børn hava fingið koronu.

Nú eru vit so loksins komin burtur frá allari vegleiðing um støður á einum arbeiðsplássi, tá ræður um koronu – øll viðurskifti, eisini sáttmálaviðurskiftini eru, sum undan koronutíðini.

Sáttmálasamráðingar og annað fundarvirksemi sýnist at verða, sum áðrenn korona. Hinvegin, so meina vit, at okkara arbeiðsgevarar eru meira friðarligir, vit hava í 2021 ikki fingið líka nógvar fyrispurningar um trupul starvsfólkamál, flokkingar o.l.

Samskiftið við okkara sáttmálapartar er økt munandi hesa somu tíðina, brúk hevur verið fyri felags fatan á fleiri frontum. Samstarvið við fakfeløgini undir koronutíðini hevur verið gott – og hevur givið gróðrarbotn fyri framhaldandi samstarvi á fleiri økjum. Hetta sæst eisini aftur í, at vit eru í gongd við felags uppgávur m.a. við Pedagogfelagið um tíð til annað arbeiði á dagstovnaøkinum – umframt at vit í næstum fara at gera kanning um setanarviðurskiftini hjá heilsuhjálparum, sum starvast á eldraøkinum og onnur tiltøk.

Fleiri samráðingar liggja fyri framman, og gongur tað sum í samráðingunum higartil, so skulu vit vænta, at fleiri av samráðingunum enda í seming. At fleiri av okkara samráðingum enda í seming er ein óheppin gongd, men ikki ein gongd, sum vit kunnu gera nakað við einsamøll.

Vit vóna, at økta samstarvið við fakfeløgini fer at gera tað møguligt í framtíðini at finna felags semjur.

Eg skal at enda takka nevndini og starvsfólkunum fyri góða arbeiðið og góða samstarvið í farna ári.

Takk fyri.

Pauli Trond Petersen, formaður

**Nevnd og starvsfólk í Kommunala Arbeiðsgevarafelagnum**

**Í nevndini í Kommunala Arbeiðsgevarafelagnum sita:**

Pauli Trónd Petersen, form. Vestmanna kommuna
Per Martin Gregersen, næst form. Eystur kommuna
Dávur Juul, nevndarlimur Fuglafjarðar kommuna
Jógvan Kruse, nevndarlimur Sunda kommuna
Bogi Bendtsen, nevndarlimur Elfelagið SEV
Jóhannus Danielsen, nevndarlimur IRF

**Starvsfólk:**

Anita Fuglø, leiðari
Bina Reginsdóttir, fulltrúi

**Sáttmálar og avtalur**

- Føroya Pedagogfelag fyri námsfrøðingar og hjálparfólk
- Starvsmannafelagið, høvuðssáttmálin og sáttmálin fyri dagrøktarar
- Heilsuhjálparafelag
- Danska Tannlæknafelagið
- Føroya Skipara- og Navigatørfelag
- Maskinmeistarafelagið
- Heilsurøktarafelagið
- Føroya Handverkarafelag/Landsfelag Handverkaranna
- Føroya Arbeiðarafelag fyri dagrøktarar

    Serstakar avtalur

    1. Búskapar- og Løgfrøðingafelag Føroya
    2. Akademikarafelag Føroya
    3. Føroya Arbeiðarafelag – renovatión
    4. Havnar Arbeiðarafelag – renovatión
    5. Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar
    6. Fysioterapeutfelag Føroya
    7. Ergoterapeutfelagið
    8. Kost- og Føðslufelag Føroya

## Viðtøkur fyri Kommunala Arbeiðsgevarafelagið

### § 1. Navn og limaskapur

Stk. 1. Navn felagsins er Kommunala Arbeiðsgevarafelagið, stytt KAF.

Stk. 2. KAF er sjálvstøðugt limafelag undir Kommunufelagnum, stytt KF.

Stk. 3. Limir í felagnum eru umframt KF, Elfelagið SEV, stytt SEV og L/F Interkommunali Renovatiónsfelagsskapurin, stytt IRF.

Stk. 4. Heimstaður felagsins er Tórshavn.

### § 2. Endamál felagsins

Stk. 1. Endamál felagsins er at fremja áhugamál limanna í øllum málum um lønar- og setanarviðurskifti starvsfólkanna. Hetta verður gjørt við at:

• samskipa lønarlagið og samráðast um sáttmála við starvsfólka- og fakfeløg, sum hava samráðingarrætt

• røkja áhugamál limanna í málum um lønar- og setanarviðurskifti, starvsmetingum, útbúgving o.a., og røkja samskifti við tey starvsfólka- og fakfeløg, sum samráðst verður við og myndugleikar annars, við neyðugum atliti til kommustýrislógina § 5, stk. 5.

• virka fyri og ansa eftir, at galdandi sáttmálar verða hildnir

• gera sítt til, at tað slepst undan trætumálum millum arbeiðsgevara og starvsfólk, ella um hetta ikki ber til, at royna at fáa tey loyst á friðarligan hátt, uttan arbeiðssteðg. Verður arbeiðssteðgur ella trætumál, røkir felagið, tá heitt verður á tað, mál arbeiðsgevaranna so langt, sum hóskandi verður hildið

• virka fyri, at trætumál limanna millum verða loyst

•við skeiðvirksemi ella á annan hátt upplýsa limir felagsins um viðurskifti, ið viðvíkja kommunalum/interkommunala arbeiðsgevara áhugamálum

### § 3. Upptøka

Stk. 1. KF og interkommunalir felagsskapir í Føroyum kunnu gerast limir við skrivliga at senda umsókn til nevnd felagsins.

Stk. 2,  Limir í felagnum skriva undir viðtøkur felagsins, soleiðis sum tær eru, ella seinni á lógligan hátt kunnu verða broyttar

### § 4. Útmeldan

Stk. 1. Eingin kann siga seg úr felagnum, uttan við innskrivaðum brævi og við 6 mánaða freist.

Stk. 2. Hóast limur sigur seg úr felagnum, er hann framvegis bundin av galdandi sáttmálum, til hesir halda uppat.

Stk. 3. Limur, sum fer úr felagnum, hevur einki krav móti felagnum.

### § 5. Ársfundur

Stk. 1. Ársfundur verður hildin á hvørjum ári innan 1. mai.

Stk. 2. Nevndin í KAF hevur rætt til at luttaka á aðalfundinum hjá KF, men ikki skyldu at luttaka.

Stk. 3. Innkalling til ársfund verður gjørd í minsta lagi 14 dagar frammanundan.

Stk. 4. Saman við innkallingini verður sendur grannskoðaður roknskapur og onnur innkomin mál.

Stk. 5. Atkvøðurættur: KF hevur 4 atkvøður, SEV og IRF hava 1 atkvøðu hvør. Ársfundurin er viðtøkuførur, tá meira enn helmingurin av atkvøðutalinum eru umboðað. Allar avgerðir á ársfundinum verða tiknar við vanligum atkvøðumeiriluta.

Stk. 6 Mál, sum skulu viðgerast á ársfundinum, skulu vera KAF í hendi seinast 4 vikur undan ársfundinum. Uppskot frá øðrum enn nevndini skulu vera felagnum í hendi í so góðari tíð, at tey kunnu takast við í fundarfráboðanina, um tey skulu koma til viðgerðar á aðalfundi.

Stk. 7. Ársfundurin verður skipaður við hesi skrá:

a) Formaðurin skipar fyri vali av fundarstjóra

b) Formansfrágreiðing um virki felagsins í farna ári.

c) Framløga av grannskoðaðum roknskapi

d) Innkomin mál.

e) Ymiskt

**§ 6. Nevndin**

Stk. 1. Í nevndini sita 6 limir, sum verða valdir av nýggjum eftir hvørt kommunustýrisval og virka til nýggj nevnd er vald. KF velur 4 limir, meðan SEV og IRF velja hvør sín lim. Á sama hátt verða 6 varalimir tilnevndir.

Stk. 2. Nýggj nevnd tekur við so skjótt, sum allir limirnir eru tilnevndir, og í seinasta lagi 1. mai.

Stk. 3. Nevndin ger sína egnu starvsskipan.

Stk. 4. Nevndin velur sjálv formann og næstformann.

Stk. 5. Nevndarfundur er so ofta, sum formaðurin metir tað vera neyðugt, ella um ein nevndarlimur setir ynski fram um tað.

Stk. 6. Nevndin er viðtøkufør, tá meira enn helmingurin av nevndarlimunum eru á fundi.

Stk. 7. Hvør nevndarlimur hevur eina atkvøðu, og avgerðir verða tiknar við vanligum meiriluta.

Stk. 8. Um tað, sum fer fram á nevndarfundi, verður gjørd fundarfrágreiðing, sum allir nevndarlimir góðkenna.

**§ 7 Skrivstovan**

Stk. 1. Fyrisitingin í KAF er partur av fyrisitingini í KF.

Stk. 2. Ovasta fyrisitingarliga leiðsla felagsins er stjórin í KF. Stjórin setur og loysir úr starvi starvsfólk í KAF í samráð við nevnd felagsins.

Stk. 3. Í øllum málum sambært § 2 virkar fyrisitingin í KAF undir leiðslu av nevnd felagsins.

Stk. 4. Skrivstovuleiðarin í KAF hevur dagligu fyrisitingina av felagnum um hendi og skal í samstarvi við stjóran í KF og nevnd felagsins umsita felagið innan fíggjarligu karmarnar og í samsvari við endamál felagsins.

### § 8 Limagjald

Stk. 1. Tá nýggir limir verða upptiknir, skal samráðast um limagjaldið.

Stk. 2. Formaðurin ger saman við stjóranum í KF og skrivstovuleiðaranum í KAF uppskot til fíggjarætlan fyri komandi ár, harundir ásetan av limagjaldi. Formaðurin leggur uppskotið fyri nevndina til góðkenningar í seinasta lagi tann 1. juli.

Stk. 3. KF rindar 2/3 av ásetta limagjaldinum. SEV og IRF rinda 1/3 av ásetta limagjaldinum, og av hesum rindar SEV 2/3 og IRF 1/3.

Stk. 4. Eingin limur heftir fyri skyldum felagsins við øðrum enn tí, sum avgjørt er at vera hansara partur av útreiðslunum, sambært fíggjarætlanini.

### § 9 Tekning

Stk. 1. Felagið verður teknað av nevndarformanninum saman við einum nevndarlimi ella saman við skrivstovuleiðaranum fyri KAF.

### § 10 Samráðingarnevnd

Stk. 1. Nevndin tilnevnir umboð og formann í samráðingarnevnd. Við sáttmálasamráðingar, sum viðvíkja SEV og IRF, kann umboð frá nevndu felagsskapum luttaka sum partur av samráðingarnevndini. Annars kann samráðingarnevndin, eftir meting nevndarinnar, víðkast við umboðum fyri teir einstøku limirnar.

Samráðingarnevndin kann, um nevndin ynskir tað, leita sær sakkunnleika aðrastaðni.

Stk. 2. Uppgávan hjá samráðingarnevndini er at samráðast við tey starvsfólka- og fakfeløg, sum hava rætt til at samráðast um øll sáttmálaviðurskifti.

Stk. 3. Samráðingarnevndin ger sína egnu starvsskipan.

### § 11 Roknskapur og grannskoðan

Stk. 1. Roknskapurin hjá KAF er ein sjálvstøðugur roknskapur, sum er partur av roknskapinum hjá Kommunufelagnum og verður grannskoðaður, sum ein partur av hesum.

Stk. 2. Inntøkur og útreiðslur fyri KAF verða neyvt atskildar frá fíggjarviðurskiftunum hjá KF annars.

### § 12 Tagnar- og upplýsingarskylda

Stk. 1. Limir felagsins hava tagnarskyldu viðvíkjandi upplýsingum um innanhýsis viðurskifti í felagnum.

Stk. 2. Limirnir hava skyldu til, eftir áheitan frá nevndini, at lata teir upplýsingar, ið hava týdning fyri at kunna samráðast, umframt upplýsingar um lønar-, arbeiðs- og útbúgvingarviðurskifti fyri starvsfólkið. Hesir upplýsingar verða viðgjørdir í trúnaði.

### § 13 Trætumál

Stk. 1. Verður arbeiðssteðgur ella trætumál millum lim í felagnum og starvsfólk tess ella fakfelagið, binda hinir limirnir í felagnum seg at stuðla og hjálpa viðkomandi limi mest møguligt við m.a. at taka lut í móttiltøkum, sum nevndin í felagnum samtykkir at seta í verk.

Stk. 2. Allir limir binda seg til, um nevndin boðar frá tí, ikki at seta fólk hjá teimum limum í starv, har arbeiðssteðgur er, fyrr enn hann er hildin uppat.

**§ 14 Gerðarrættur**

Stk. 1. Trætumál millum felagið og lim kann leggjast fyri gerðarrætt.

Stk. 2. Í gerðarrættinum eru tveir limir, har felagið velur annan og limurin hin, umframt ástøðumann, sum verður tilnevndur av Føroya rætti.

Stk. 3. Avgerðin hjá gerðarrættinum er endalig og kann ikki leggjast fyri vanligu dómstólarnar.

**§ 15 Avtøka av felagnum**

Stk. 1. Felagið verður tikið av, tá ið minst ¾ av limunum ynskja tað.

Stk. 2. Verður felagið tikið av, verða ognir felagsins býttar millum limir felagsins á tann hátt, at miðaltalið fyri limagjaldið trý tey seinastu árini gevur lutfalstalið til hvønn lim.

**§ 16 Gildiskoma**

Stk. 1. Hesar viðtøkur fáa gildi, tá ið tær eru samtyktar á aðalfundi í KAF.

Tórshavn hin 12. mars 2014